## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og eystri og stundum regn. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Bátur nýtti níggju tímar úr Bergen til Havnar



*Her liggur báturin Soli á Havnini og umvælir skaðan*




SIGLING

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Níggju tímar og sjey minuttir, so skjótt hevur ongin fyrr siglt teinin millum Føroyar og Noregi. Seinasta mikudag klokkan 10:43 settu Thomas Guttormsen og Lars Narverud kós úr Bergen móti Føroyum í einum speedbáti, sum minnir nógv um teir, sum verjuskipini undir Føroyum nýta. Gott veður var og ferðin lá millum 50 og 80 míl. Klokkan 19.50 ella góðar níggju tímar og sjey minuttir seinni vóru teir á Havnini. Høvdu okkara forfedrar víkingarnir vitað til sín.

Í Havn bunkraðu teir brennievni og gjørdu smávegis umvælingar og síðan var hildið leiðina fram ein tíma seinni. Endamálið við ferðini var at seta fartmet millum Bergen og Reykjavík. Málið var at sigla teinin upp á 30 tímar.

Men 20 fjóðingar vestan fyri Føroyar fór okkurt í tí eina motorinum og teir noyddust at venda aftur. Teir sigldu við 10 míla ferð aftur til Føroyar.

Teir hava nú ligið á Havnini og kanna møguleikarnar fyri at umvæla skaðan.

### Drúgvar fyrireikingar

Fyrireikingarnar til ferðina hava vart í fleiri ár. Báturin er 34 føtur, ein gummibátur við hørðum botni. Páhangsmotorarnir geva tilsamans 1000 hestakreftir. Báturin er sera væl útgjørdur, og kann sigla 50 míl, sjálvt tá tað er óslætt.

Thomas Guttormsen og Lars Narverud settu met á leiðini millum Olso og Keypmannahavn í 1998. Hetta met kom í Guinness Book of Records og er ikki sligið enn.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | 15 |
| Halifax | 9 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 12 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | – |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 25 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 28 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

### LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 995 hPa yvir Ermasundi fer spakuliga vestureftir og hitabrúgvin haðani til Føroya fer eisini vestureftir.



Lágtrýstið yvir Írlandi stendur mestsum í stað og millum lágtrýstið og hátrýstið yvir Norska Havinum rekur lýggj luft móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/06 kl. 06⁰⁰– 06/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,4°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 05/06 kl. 06⁰⁰– 06/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 24,6 mm

Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT

### VESTFALLSKYRRINDI

3. juni: Seinna kvarter
4. juni: Mánin longst frá jørðini
10. juni: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. juni | 04.52 | 17.10 | 03.52 | 16.10 | 04.07 | 16.25 | 06.52 | 19.10 | 07.52 | 20.10 | 03.07 | 15.25 | 02.07 | 14.25 | 05.07 | 17.25 | 06.07 | 18.25 | 04.37 | 16.55 | 05.52 | 18.10 |
| 8. juni | 05.29 | 17.48 | 04.29 | 16.48 | 04.44 | 17.03 | 07.29 | 19.48 | 08.29 | 20.48 | 03.44 | 16.03 | 02.44 | 15.03 | 05.44 | 18.03 | 06.44 | 19.03 | 05.14 | 17.33 | 06.29 | 18.48 |
| 9. juni | 06.09 | 18.30 | 05.09 | 17.30 | 05.24 | 17.45 | 08.09 | 20.30 | 09.09 | 21.30 | 04.24 | 16.45 | 03.24 | 15.45 | 06.24 | 18.45 | 07.24 | 19.45 | 05.54 | 18.15 | 07.09 | 19.30 |
| 10. juni | 06.52 | 19.15 | 05.52 | 18.15 | 06.07 | 18.30 | 08.52 | 21.15 | 09.52 | 22.15 | 05.07 | 17.30 | 04.07 | 16.30 | 07.07 | 19.30 | 08.07 | 20.30 | 06.37 | 19.00 | 07.52 | 20.15 |

5 707265 100050